# Reglugerð fyri Fjarskiftiseftirlitið frá 9. juli 1999

Við heimild í § 12, stk. 3 í Løgtingslóg nr. 79 frá 23. mai 1997 um Fjarskifti, hevur landsstýriðmaðurin fyri virki Fjarskiftiseftirlitsins ásett:

§ 1 Fjarskiftiseftirlitið er stovnur undir Vinnumálastýrinum, sum m.a. umsitur tær í stk. 2 nevndu uppgávur á fjarskiftisøkinum.

Stk. 2. Uppgávurnar hjá Fjarskiftiseftirlitinum eru m.a.

1. Áhaldandi virka fyri at fremja kapping innan fjarskifti, við tí fyri eyga, at geva brúkararunum, vinnulívi v.m. atgongd til eitt fjøltáttað og breitt útboð av fjarskiftisveitingum til lágar prísir og við høgari góðsku, sambært endamálið lógarinnar.
2. Eftirlit við og taka avgerðir á fjarskiftisøkinum, í tann mun hetta er stovninum lagt til.
3. Eftirlit við at fjarskiftisveitarir halda og uppfylla teirra skyldur sambært koncessiónum og galdandi reglum annars.
4. Áseta fyrisitingarligar reglur á økjum har heimildin til tess, er løgd til Fjarskiftiseftirlitið.
5. Veita ráðgeving um galdandi lóggávu og um onnur viðurskifti á fjarskiftisøkinum.
6. Ráðgeva landstýrismanninum og miðfyrisitingini annars um faklig viðurskifti á fjarskiftisøkinum og harvið eisini tryggja áhaldandi eftirmeting og kunning um royndirnar viðvíkjandi galdandi lóggávu á fjarskiftisøkinum.
7. Ráðgeva landstýrismanninum um møguligan tørv á broytingum ella viðkan av galdandi lóggávu fyri fjarskiftisøkið, orsaka av t.d. vinnuligum, bygnaðarligum ella tøkniligum broytingum.
8. Fylgja teirri tøkniligu og búskaparligu menningini innan fjarskifti og kunningartøkni.
9. Fjarskiftiseftirlitið luttekur, í samráð við landsstýrismannin og eftir førimuni, í norðurlendskum, evropeiskum og altjóða samstarvi innan fjarskifti og virkar fyri at tryggja áhugamálini hjá Føroyum innan fjarskifti.
10. Fjarskiftiseftirlitið móttekur, viðgerð og ummælir umsóknir um koncessión til fjarskifti og ger tilmæli til landsstýrismannin.
11. Eftirlit við, at fjarskiftisútbúnaður líkur galdandi reglur.
12. Fáa semju í lag millum koncessiónhavar í sambandi við sambinding av almennum fjarskiftiskervum.
13. Umsitir einkarætt landsins sambært fjarskiftislógini § 3, stk. 2 til nummartilfongi eftir fyrisitingarsiðvenju, á hædd við grannatjóðir Føroya t.d. Ísland og skal tryggja, eitt nú, eina skilagóða nýtslu av tilfonginum, tøkniligan tryggleika, persónsvernd og at fjarskiftistænasta verður lagað eftir tørvi.
14. Eftirlit við prís og -tænastumenningin. Savna saman og almannakunngerða hagfrøðiligar upplýsingar um viðurskifti innan fjarskiftisøkið, sum verða mett neyðug fyri at tryggja skynsamiliga nýtslu av tilfonginum og kapping á fjarskiftisøkinum.

§ 2. Fjarskiftiseftirlitið skal á hvørum ári innan 15. mars leggja fyri landsstýrismannin frágreiðing, um virksemi stovnsins og gongdina á fjarskiftismarknaðinum.

Vinnumálastýrið tann 9. juli 1999

Finnbogi Arge,
Landsstýrismaður

Arne Poulsen,
Aðalstjóri